# Møtir úti og inni

Varmakelda: Ein sjálvsagdur partur av eini stevnuskrá eru tey kristiligu tiltøkini. Soleiðis verður eisini í ár, har bæði kirkjan, missiónshúsið og samkomuhúsið verða karmur um fleiri tiltøk. Í kvøld kl. 21 verður ein varmakelduvøka í kirkjuni við tónleiki, upplestri, solosangi og felagssangi, og kl. 22 ungdómsmøti í Thabor og opið hús á midnátt. Leygarkvøldið verður opið hús í Siloa, og sunnukvøldið hevur missiónshúsið útimøti við Mentanarhúsið, har bæði manskór og ung luttaka við sangi og vitnisburðum. Sunnudagin kl. 11 verður gudstænasta, har sóknarpresturin Uni Næs prædikar.



# Dansur fyri seinastu ferð

Varmakelda: Aftur leygarkvøldið fer orkestrið Showmenn at spæla fyri allar seinastu ferð. Hetta hendir við ársins Varmakeldudans, sum verður í Mentanarhúsinum við 18 ára aldursmarki. Somu tíð verður dansur í Lonini við 25 ára aldursmarki og diskotek í høllini á Kambsdali. Til diskotekið er skipað soleiðis fyri, at bussur fer at koyra millum Fuglafjørð og Kambsdal.

## Musik-café og yrkingalestur

Varmakelda: Tey, ið hava áhuga at njóta ein góðan drekkamunn aftur við tónleiki og upplestri av yrkingum, verða ikki við sviðusoð um vikuskiftið.

Cafe'in í Mentanarhúsinum verður nevniliga karmur um eina sera fjølbroytta skrá, har byrjað verður longu í kvøld kl. 20:30. Tá fara Pól Esbern Hanusarson og Búgvi Hanusarson at framføra, og seinni verður dansur við DJ-Sleice.

Leygardagin verður aftur ein fjølbroytt skrá. Byrjað verður kl. 17 og hildið verður á til langt út á kvøldið.

Tá hava fólk møguleika at hoyra so ymisk fólk sum Búa Dam, Elly Johannesen og Rakul Petersen, Øssur Johannesen og Hjalta Joensen, Carl Jóhan Jensen, Hans Jákup Kollslíð og Oddfríður Marna Rasmussen.

## Øssur í Ribarhúsi

**Varmakelda:** Eingin stevna í Fuglafirði uttan eina sanna listaframsýning.

Um vikuskiftið fer listarmaðurin Øssur Mohr at sýna fram 20 av sínum nýggjastu málningum.

– Tað eru tvey ár síðani vit hava upplivað eina framsýning í Føroyum við Øssuri. So hetta verður ein spennandi framsýning, verður sagt úr Fuglafirði.

Seinastu árini hevur Øssur ferðast víða og sýnt fram síni verk. Hann hevur verið bæði í Danmark, Íslandi, Noregi, Týsklandi, Fraklandi og nú verður hann altso í heimbýnum Fuglafirði.

Seinni í ár fer hann at hava framsýning í Polen.



*Alt er klárt til stevnuna í Fuglafirði um vikuskiftið. Vónandi verður veðrið teimum til vildar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Varmakelda til ein og hvønn

**Fyrstu tiltøkini á ársins stevnu hava longu verið. Fyrst um vikuskiftið kemur rættilig gongd á stevnuna. Ímorgin kl. 14 verður stevnan sett á økinum omanfyri Mentanarhúsið av Egoni Øregaard**

STEVNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Hóast nógvar stevnur eru kring landið, og nógvar teirra líkjast, hava fyrireikararnir av Varmakeldu gjørt sítt til, at teirra stevna hevur nakað at bjóða øllum.

Tiltøkini eru av øllum møguligum slagi, og tá er líkamikið um ein er áhugaður í ítrótti, kappróðri, mentan, kristiligum tiltøkum, dansi ella ein bara hevur hug at hava tað stuttligt eitt vikuskiftið í Fuglafirði.

Nógv verður somuleiðis gjørt fyri børnini. Eitt er tað at tey luttaka við ymisk ítróttartiltøk. Hinvegin er eisini nógv gjørt fyri at stuttleika børnunum og teimum barnsligu sálunum.

Tjøld við ymiskum kappingum eru sjálvsagdur partur av einihvørjari stevnuskrá, og soleiðis er eisini um vikuskiftið.

Eitt serligt barnatiltak verður haraftrat í annaðkvøld kl. 18, har gyklarin Asbjørn Berthelsen av Strondum fer at vísa síni kynstur í Mentanarhúsinum.

### Eingin kelduvitjan

Eitt fast tiltak á stevnuskránni eru fundirnir.

Byrjað verður við setanini seinnapart leygardag og um kvøldið er aftur midnáttarsamkoma við Mentanarhúsið.

Undanfarin ár hevur eitt tiltak verið at fara út á sjálva Varmakeldu, eftir hvørjum stevnan hevur fingið sítt navn. Men í ár verður hetta ikki gjørt.

Tað vísir seg, at undirtøkan til hetta tiltakið hevur ikki verið tað stóra tey seinnu árini, helst tí at tað liggur so fjart frá býnum.

Ein onnur, og helst ikki minni avgerandi orsøk er, at tað hevur viðrað so stak illa tey seinastu fýra árini á stevnuni. Tí er avgjørt at flyta tiltakið til eitt stað, sum er tættari við fólkið og har meiri lívd er at finna.

Leygarkvøldið fer nevniliga løgtingsmaðurin Høgni Hoydal at halda midnáttarrøðu við Mentanarhúsið. Her verður somuleiðis felagssangur og verður endað við fýrverki.

Sunnudagin kl. 14:30 verður fólkafundur á sama øki. Her fer Dánjal Vang at halda røðu, umframt tað at felagssangur og hornbløstur verða á skránni.

### Framsýning og uppboð

Í Fuglafirði hevur mentanin altíð átt sín sjálvsagda lut. Og hetta fer eisini at seta dám á stevnuna um vikuskiftið.

Ikki færri enn tvær listaframsýningar eru á skránni: Ein við listafólkum úr øllum landinum í hølunum hjá Arbeiðsmannafelagnum og ein hjá Øssuri Mohr í Ribarhúsi.

Aftur í ár verður høvið hjá fólki at ogna sær ein málning á uppboðssølu eftir ein av málarum okkara - harav onkur fuglfirðingur eisini er millum teirra.

Á stevnuni verður skipað soleiðis fyri, at sunnukvøldið kl. 20 verður Varmakeldukonsert við Hans Hjalta Skaale og Helga Midjord í Mentanarhúsinum, og tá hon er liðug tveir tímar seinni, er klárt at fara undir uppboðssøluna.

Her verða nógv kend listafólk við, m.a. Eyðun av Reyni, Achibald Black, Kári Sverrisson og fuglfirðingurin Øssur Mohr.

Ein líka so kendur maður fer at standa fyri hesi uppboðssøluni, eingin annar enn Torbjørn Jacobsen.

– Hetta er ein løta, ið heilt vist er verd at vitja, verður sagt úr Fuglafirði.